# Kollfirðingar leysir av botninum

*Somikið væl hevur gingist hjá KÍF í endaspælinum, at tær nú eru væl og virðiliga leysir av botninum. Sunnudagin løgdu teir enn meira sjógv millum seg og Tjaldur*



*Emil Petersen (her í dysti móti Neistanum) og liðfelagarnir hava nú rættuliga slitið seg leysar frá teimum báðum niðastu liðunu, H71 og Tjaldur*

***Savnsmynd***

JÁKUP MØRK

KÍF-Tjaldur 31-21 (12-7)

So at siga alt grundspælið høvdu kollfirðingar ivasama heiðurin av at eiga niðasta liðið í bestu mansdeildini

Eftir at farið varð í holt við endaspælið, er henda støða tó broytt nakað. Bæði móti Tjaldur og H71 hava kollfirðingar verið omaná, og tá Tjaldur sunnudagin vitjaði høllina í Vestmanna, sum enn er heimavøllur kollfirðinga, var als eingin ivi.

### Kunnu hugsa um næsta ár

Kollfirðingar hølvaðu nevnliga Tjaldur av, uttan at spenningur nakran tíð kom í dystin.

Eftir knappar tíggju minuttir, var munurin millum liðini longu fimm mál, og hóast Tjaldur royndi at muta nakað ímóti, so fingu teir ongan tíð skapt nakað av spenningi í dystinum.

Serliga gjørdi Óla Kristian sítt til, at runavíkingarnir ikki fingu bóltin nóg ofta inn um mállinjuna, og í hinum endanum var tað Petur Martin Poulsen, sum gjørdi mest um seg.

Støddina og styrkina hevur hann við sær, og tá skotini so sita somikið væl, sum tey gjørdu í hesum dysti, er ikki nógv at gera hjá mótstøðuliðunum. Ikki færri enn 12 mál fekk hann í dystinum, og átti hann sostatt sín stóra lut í sigrinum sunnudagin.

Annars er tað aloftast ein annar Petur Martin, nevnliga Johansen, sum vanliga er stóri málslúkurin hjá KÍF, men sunnudagin var hann mansvardur meginpartin av dystinum, og tískil slapp hann ongantíð at spæla tann leiklut, sum hann er vanur við.

Hetta tóktist tó ikki at nerva kollfirðingarnar nakað serligt, og nú kunnu teir helst byrja at fyrireika seg til komandi kappingarár.

Í øllum førum er líkt til, at teir verða verandi á fimta plássinum tað, sum eftir er av kappingarárinum. Enn hava teir tó ein dyst eftir móti H71, men tá sæð verður burtur frá hesum, skulu teir helst ikki vænta sær tey nógvu stigini.

### Gingið illa

Hjá Tjaldur hevur tað hinvegin gingið av skriðuni, síðani stigini vórðu hálvbýtt. Sjey dystir í endaspælinum hava ikki kastað nakað av sær, og eisini er líkt til, at hetta hevur gingið út yvir avrikini og hugin á vøllinum.

Liðið var eitt nú rættuliga illa mannað til dystin sunnudagin, og fleiri av teimum leikarum, sum vóru á vøllinum, nýttu meira orku til at brúka seg, heldur enn at hugsa um spælið við lítlu leðurkúluni.

Sverri Justinussen royndi tó sítt, men ein leikari er ikki nóg mikið til at lyfta alt liðið, og tá hvørki Tummas ella Elias vóru at hjálpa til, gekk tað sum tað gekk.

Tjaldur er nú á niðasta plássinum á stigatalvuni, og skulu teir hava nakran møguleika at flyta seg av hesum, er helst neyðugt við einum sigri, tá teir á seinasta leikdegi skulu leika móti hoyvíkingum.

Áðrenn tað skulu teir royna seg móti teimum fýra liðunum, sum mynda ovaru helvtina av stigatalvuni, og nógv skal broytast, um teir skulu fáa nakað sum helst burtur úr teimum dystunum. Eingin ivi um tað.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
KÍF: Petur Martin Poulsen 12, Petur Martin Johansen 4 (3), Jónálvur Johannesen 4, Vagnur Johannesen 4, Jákup Dam 3, Emil Petersen 2, Finn Heri Johannesen 2
Tjaldur: Sverri Justinussen 10 (4), Arnfinn Langgaard 4, Mortan Hansen 3, Ragnar Olsen 1, Súni Fríði Johannesen 1, Ken Bærentsen 1, Trygvi Mortensen 1
**Brotskøst:**
KÍF 3, Tjaldur 4
**Útvísngar:**
KÍF 5, Tjaldur 2
**Diskvalifikatión:**
KÍF 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar úr Kyndli:**
Gunnar Gregorieussen og Ragnar Simonsen

# Kyndil jagstrar stjørnurnar

*Kyndil helt lív í FM vónunum, tá tær sunnudagin endurtóku steypasigurin á VB, men hóast sigurin í tølum kann tykjast nóg so tryggur, so leikaði leingi javnt á, áðrenn havnargenturnar avgjørdu alt innan 10 minuttir*

JÁKUP MØRK

VB-Kyndil 21-26 (13-15)

Skuldi Kyndil framhaldandi halda lív í vónunum um FM-heitið, var kravið undan vikuskiftinum sera einfalt. Ein sigur á VB var einasta úrslitið, sum tær kundu nýta til nakað sum helst í hesum sambandi, og tað var eisini hetta, sum var aðalmálið, tá tær fóru á vøllin sunnudagin.

Í landskappingini hevur ikki hilnast nakað serligt hjá VB liðnum, men hinvegin høvdu tær ósigurin í steypafinaluni at hevna, so kyndilsliðið hevði eina alt annað enn lætta uppgávu, tá farið varð á vøllin.

### Javnt í fyrra

At byrja við var heldur ikki nakað sum týddi á, at kyndilsleikararnir bara skuldu fara avstað við stigunum uttan víðari.

Tær á heimaliðnum gjørdu sítt til, at munurin millum liðini bæði ongantíð gjørdist nakað serliga stórur, og serliga vóru tað kviku mótálopini sum gjørdu sítt til, at VB alla tíðina var við í dystinum.

Eftir at Kyndil hevði havt eina lítla leiðslu meginpartin av fyrra hálvleiki, eydnaðist tað eisini heimaliðnum at vinna seg fram um móti endanum av fyrra hálva tímanum, men seinastu løtuna fingu havnargenturnar trý mál á rað, og so var leiðslan vunnin aftur.

### Skrædnaði í seinna

Seinna hálva tíman var gongdin so at siga hin sama, men um miðjan hálvleikin, fingu tær á útliðinum brádliga glið á. Seks mál á rað gjørdu sítt, og hóast VB móti endanum aftur fekk nøkur mál, so var dysturin í roynd og veru avgjørdur hesa løtuna.

Hetta er ikki nakað ókent fyribrigdi hjá VB, tí í fleiri dystum hetta árið, hava tær spælt sera væl í løtum, fyri síðani at missa takið fullkomuliga í einar tíggju minuttir.

Onkur vildi kanska sagt, at hetta er tekin um eina ov vánaliga venjingarstøðu, men heldur er hetta orsakað av, at breiddin í hópinum ikki er so øgiliga stór.

Ljós er tó fyri framman, tí fleiri ungar og evnaríkar gentur eru á veg móti besta liðið felagsins, og onkur av hesum ungu leikarum hevur longu bitið seg rættuliga fastan á liðið.

### Royna framvegis

Hevur VB liðið einki at spæla fyri restina av kappingarárinum, so er øðrvísi statt á kyndilsliðnum, nú helmingurin av endaspælinum er farið aftur um bak.

Jórun Ludvig, liðskipari hjá Kyndli, sigur við Sosialin, at enn hava tær ikki mist allar vónir um gullið, hóast tað kanska kann gerast heldur enn ikki torført.

-Vit vera noyddar at vinna tað, sum eftir er av dystum, greiðir hon frá, tá vit spyrja hana um, hvussu vónirnar eru til týsdagin, tá verandi føroyameistararnir skulu til Klaksvíkar at vitja liðið, sum í løtuni sær út til at gerast komandi føroyameistarin.

Í løtuni mugu tær tó royna at taka ein dyst í senn, og útlitini fyri einum sigri í Klaksvíkini gjørdust í hvussu so er ikki verri av teirri sannroynd, at verjuparturin í løtum riggaði sera væl har suðuri, umframt at Anya Midjord tykist at vera komin rættuliga fyri seg aftur, ti sum skilst, leikti hon ein sera góðan dyst á strikuni.

Hvussu langt hetta fer at røkka týsdagin vita vit av góðum orsøkum ikki enn, men so leingi vónin livir, eru allir møguleikar so framvegis opnir.



*Hesu ferð varð Jensia Petersen mest nýtt í verjupartinum, meðan hon í álopspartinum varð loyst avloyst av Anyu Midjord, sum nú rættuliga tykist vera komin fyri seg*

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Gurið Mortensen 6 (2), Regina Rádó 5, Sólrun Krosslá 4 (1), Rannvá Augustinussen 2, Arnleyð Krosslá 2, Christina Holm 2
Kyndil: Lotte Sørensen 11 (6), Ann Hansen 4, Palma Petersen 3, Jórun Ludvig 2, Frida Johannesen 2, Rakul Joensen 2, Anya Midjord 1, Jensia Petersen 1
**Brotskøst:**
VB 4, Kyndil 7
**Útvísingar:**
VB 1, Kyndil 3
**Dómar úr Tjaldur:**
Dánjal Hansen og Kári Hansen



# Enn eitt fet nærri gullinum

*Stjørnan stevnir móti FM-heitinum við fullari ferð, og sunnudagin var enn eitt mótstøðulið skúgva til viks, tá Neistin vitjaði í Klaksvík*



*Stjørnan stevnir við rúkandi ferð móti føroyameistaraheitinum, og sunnudagin mátti Neistin leggja rygg til stórtap, tá klaksvíksgenturnar, so at siga uttan leikandi venjaran, sýndu satt meistaraspæl eina løtu í dystinum*

JÁKUP MØRK

Stjørnan-Neistin 31-22 (15-13)

Síðani fyrsta leikdag, hevur kvinnuliðið hjá Stjørnuni verið ovast á stigatalvuni, og sannlíkindini fyri, at hetta broytist í ár, minka fyri hvørt umfar.

Sunnudagin áttu Neistagenturnar tørn, og ikki gekk long tíð, áðrenn heimaliðið hevði sagt gestunum, at her skuldu tær ikki vænta sær nakað stig.

### Spurningur um stødd

Tær á hemaliðinum løgdu nevnliga fyri sum eitt óløgi. Fyrstu løtuna av dystinum runnu tær snøgt sagt mótstøðuliðið niður og norð, og áðrenn neistaliðið fekk fóta sær, vóru longu sjey mál á muni.

Sum ikki eina ferð, so viðførdi stóra leiðslan tó, at leikararnir gjørdust minni nærlagdar, og so við og við kom meira glið á spælið hjá havnargentunum.

Spakuliga otaðu tær seg nærri og nærri at Stjørnuni, og móti endanum av hálvleikinum var tað um reppið, at fingu strítt seg upp á javnleik.

Nærri enn einum máli komu tær tó ongantíð, og eftir at hvílt seg eina løtu í hálvleikinum, kom rætta lagið aftur á heimaliðið.

Fyrra korterið av seinnu hálvuni endurvunnu tær aftur tryggu leiðsluna, og so við og við gjørdist alt bert ein spurningur um, hvussu stórur sigurin hjá heimaliðnum skuldi verða.

### Gullið nærkast

Tá avtornaði vóru níggju mál á muni millum liðini bæði, og hóast tær ikki hava vissað sær FM-heitið enn, so munnu sjálvt teir mest svarskygdu klaksvíkingarnir nú rokna við, at Klaksvíkin so smátt kann fara at brynja seg til enn eina gullveitslu.

Í hvussu so er skulu stjørnuleikararnir bera seg óvanliga tápuligt at, um tað skal eydnast teimum av tveita FM-heitið burtur, hóast tað enn eru fimm umfør eftir at leika.

Enn tvey fet á vegnum kunu takast komandi vikuna, tá fyrst Kyndil (týsdagin) og síðani VB (leygardagin) koma á vitjan.

Vinnur Stjørnan hesar báðar dystirnar, hava tær vunnið sær 23 stig, og um so er, eru tað bert vestmannagenturnar, sum koma ájavnt í stigum.

Dystirnir skulu tó spælast, áðrenn stigini eru komin í posan, men einki er at taka seg aftur í, at klaksvíksgenturnar eru risa favorittar til at vinna FM-heitið.

Nógv hevur verið tosað um, at tað í stóran mun eru útlendsku leikararnir, sum hava tryggjað teimum nógv av stigunum, men einki er at taka seg aftur í, at lokalu stjørnurnar so sanniliga eisini eiga sín part av heiðrinum.

Í øllum førum sat leikandi venjarin, Vesna Tomajek, á beinkinum meginpartin av dystinum sunnudagin, uttan at hetta nervaði spælinum í serliga stóran mun.

### Silvurið er eftir

Neistaliðið hevur framvegis silvurmerkini at stríðast fyri, men í løtuni eru tær helst tað liðið, sum hevur ringastu kortini á hondini í so máta.

Tvey stig eru upp til VÍF og Kyndil, sum eru jøvn á øðrum og triðja plássinum, men málmunurin hjá Neistanum er væl verri enn hjá hinum báðum, so skulu tær vinna seg upp á annað plássið, verða tær helst noyddar at fáa fleiri stig enn VÍF og Kyndil.

Hetta er tó als ikki ógjørligt, tí enn restar helvtin av endaspælinum, so enn kunnu tær sjálvar gera av, hvørja lagnu silvurvónir teirra fáa.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Andriajana Milodanovic 7, Simona Hansen 6 (1), Joan M. Joensen 5 (1), Annika Ljósstein 5 (2), Anna K. Samson 5, Vesna Tomajek 1 (1), Una Olsen 1, Ragna Andreasen 1
Neistin: Katrin á Neystabø 8 (5), Marjun Jógvansdóttir 5 (3), Ileana Manolescu 4, Birita Wardum 3, Mildrid Jacobsen 1, Gunnleyg Berg 1
**Brotskøst:**
Stjørnan 8, Neistin 9
**Útvísingar:**
Stjørnan 3, Neistin 3
**Dómarar úr VÍF:**
Erling Heinesen og Alfred Hummeland

# Tíggju daga freist

***Ársaðalfundur:*** *Fótbóltfeløgini tóku undir við at uppskot til nevndarval skulu vera almannakunnugjørd undan sjálvum fundinum*

Leygardagin varð Torleif Sigurðsson afturvaldur til formann í Fótbóltssambandinum í eitt tvey ára skeið, og Dánjal Andreasen, Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt vórðu afturvaldir sum nevndarlimir fyri tvey ár.

Í fráboðanini til fundin høvdu feløgini fingið at vita, at hesir stóðu fyri vali. Men tað stóð einki í fráboðanini um onnur møgulig uppskot. Tað stóð heldur einki um, um omanfyri nevndu tóku við afturvali og um nevndin í FSF mælti til afturval. Hetta síðsta hevur verið vanligt, men undan fundinum í fjør var kunningarmongdin eins lítil, sum hon var í ár.

Formaðurin og nevndarlimirnir vórðu afturvaldir við lógvabrestum. Men fundurin samtykti eisini, at í framtíðini skal tað longu undan fundinum vera greitt, hvørji uppskot eru til nevndarval.

Uppskot til nevndarval skulu vera FSF í hendi í seinasta lagið tíggju dagar undan aðalfundinum, og tað vil við øðrum orðum siga, at limafeløgini nú fara at hava møguleika at viðgera, hvørjum tey skulu atkvøða fyri, áðrenn tey senda umboð á ársaðalfundin.

Nýggja mannagongdin verður fyrstu ferð roynd á aðalfundinum komandi ár. Hann verður í síðsta lagi í februar í 2001, og tá standa fyri vali Bøgre B. Hansen, næstformaður, og nevndarlimirnir Jens Erik Magnussen og Óli Holm.

JH

# LÍF fekk trý túsund krónur

***Leikum fagurt:*** *Ætlanin er at broyta útrokningarháttin, men einki varð nevnt um, at samlaða upphæddin skal økjast*

Trý túsund krónur. Hetta var upphæddin, sum tey sekstan feløgini, ið eru umboðað í trimum teimum bestu fótbóltsdeildunum á mannfólkasíðuni, í alt kvalifiseraðu seg til at fáa útgoldið frá Tryggingarfelagnum Føroyar, sum seinastu átta árini hevur havt eina leikum fagurt avtalu við Fótbóltssambandið.

Tá farið verður undir fyrsta umfarið í landskappingini eiga øll feløgini tjúgu túsund krónur á konto. Fyri hvørt gult kort verða eitt túsund krónur drignar frá, og higartil hevur tað verið soleiðis, at fýra túsund krónur hava verið drignar frá fyri hvørt reytt kort. Nú er ætlanin at broyta hetta, soleiðis at tað fer at kosta trý túsund krónur fara at fáa eitt reytt kort.

Leirvíkingar vóru teir einastu, sum áttu nakað eftir á trygginarkontoini, og Jákup Marner Sólbjørg tók vegna LÍF ímóti kekkinum og steypinum frá Jens Peter Arge, stjóra í Tryggingini.

Tað hevur verið kappast um steyp og pengar í sjey ár. Ásetingarnar siga, at kappingin skal vera í tíggju ár. Vinnararnir síðani 1993 hava verið Skáli, SÍ, Æsir, NSÍ, eingin í 1997, LÍF og LÍF.

Merkisvert er, at einki av feløgunum, sum higartil hevur vunnið kappingina, hevur verið umboðað í bestu deildini.

JH